Umsett úr donskum. Í ivaspurningum verður víst til donsku upprunaútgávuna.
https://www.ft.dk/ripdf/samling/20231/redegoerelse/R10/20231_R10.pdf

---

Frágreiðing frá forrsætisráðfrúnni (Mette Frederiksen) 28. februar 2024

## Frágreiðing um ríkisfelagsskapin 2024 (Skrivlig frágreiðing)

Í hesi frágreiðing til Fólkatingið verður kunnað um búskapin hjá Føroyum og Grønlandi umframt um samarbeiði, framtak og felags átaksøkjum hjá stjórnini við atliti at Føroyum og Grønlandi.
Evnini í frágreiðingini ber boð um eina raðfesting, og tað er lagt upp fyri aðrar frágreiðingar í sambandi við ríkisfelagsskapin, teirramillum R 6 (12/10 2023) um samstarvið í Arktis, R 4 (12/10 2023) um norðurlandasamstarv 2023 og R 3 (6/10 2021) um marknaðforðingar í Norðanlondum. Víst verður til Frágreiðing um ríkisfelagsskapin 2014 (R 12 8/4 2014) til kunningar um sálvstýrisskipanirnar, teirramillum ríkisstuðulin til Føroya og Grønland.

## 1. FØROYAR

### 1.1 Búskapur Føroya

*Føroyski búskapurin hevur havt framgongd síðani 2011, uttan eina stutta afturgongd í sambandi við alheimsfarsóttina 2020. So at siga øll eru í arbeiði. Góði byrurin í príslagsgongdini hevur seinastu árini havt avlop í landskassanum við sær. Í 2024 er ætlað, at javnvág skal verða í landskassanum. Fíggjarpolitikkurin fyri framtíðina er ikki haldførur enn.*

*Fíggjarpolitiskt haldføri o.a.*

Búskaparráðið í Føroyum (Ráðið) hevur 16. januar 2024 almannakunngjørt dagførdar útrokningar av fíggjarpolitiska haldførinum. Ráðið metir tørv vera á varandi fíggjarætlanarbatum upp á 9 prosent av BTÚ ella um 2 mia. kr. fyri at tryggja javnvág millum almennar inntøkur og útreiðslur í framtíðini. Fíggjarpolitikkurin er sostatt ikki haldførur. Føroyar standa framman fyri eini stórari íbúgvafrøðiligari broyting. Í dag eri um fýra fólk í vinnuvirknum aldri fyri hvørt fólk í eftirlønaraldri. Í 2060 fara tað at verða góð tvey vinnuvirkin fólk fyri hvørt fólk í eftirlønaraldri. Fólkafrøðiligu broytingarnar fara at hava øktar útreiðslur við sær til m.a. eftirløn, eldrarøkt og heilsurøkt.

Samgonguskjalið frá 22. desember 2022, at Føroya landsstýri fer at tryggja haldføran og sjálvberandi búskap, har hall á almennari fígging verður vend til avlop, og har tað ár um ár verður nærkast málinum um langtíðarhaldføran búskap. Tilevnað verður fíggjarpolitiskt regluverk og umskipanir gjørdar í tilfeingisgjøldunum í fiskaalivinnuni og í fiskivinnuni. Skrivað stendur eisini, at skattastigin skal endurskoðast til tess at lætta um hjá láglønarbólkum og økja um útboðið av arbeiðsmegi. Lág- og miðallønt fáa ein skattalætta, sum verður fult fíggjaður. Hinvegin eru ætlanir um, at arbeiðsvikan verður stytt ein tíma annað hvørt ár, til hon er 37 tímar. Bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum er arbeiðstíðin 39-40 tímar um vikuna. Á umsorganarøkinum er ætlanin, at tey lægst løntu fáa lønarhækking, so tað gerst lættari at halda og útvega starvsfólk.

Tað er fyrr avgjørt, at eftirlønaraldurin í Føroyum verður hækkaður fram móti 2030 frá 67 árum til 68 ár. Tó er ikki talan um æviskeiðsraðing, sum Ráðið fyrr hevur tilmælt. Eftirlønaraldurin kann hægst

økjast eitt hálvt ár fimta hvørt ár. Ráðið hevur tí borið fram, at tað er neyðugt við fleiri tiltøkum, t.d. at eitt fíggjarpolitiskt regluverk verður sett í verk, at tilfeingisgjøldini í fiskivinnunum verða hækkað, at skattafrádrátturin til føroyingar, ið arbeiða uttanlands verður lækkaður, og at stuðulin hjá landskassanum til rentuútreiðslurnar hjá húsarhaldunum verður lækkaður, umframt, at eldraøkið verður gjørt virknari.

Løgtingið samtykti í mai 2023 at broyta tilfeingisgjøldini á fiski og alifiski. Samstundis varð samtykt, at gjald skal leggjast á fiskasløg, sum ikki fyrr hava verið umfevnd. Landsstýrið metir, at broytingarnar fara at økja inntøkurnar til landskassan við um 275 mió. kr. árliga ella 1,1 % av BTÚ.

Búskapargrunnur Føroya varð stovnaður 2011 og hevur til endamáls at styðja sjálvberandi búskap og vera við til príslagsjavning. Grunnurin hevði smávegis inntøkur fram til 2016, tá inntøkugrundarlagið varð víðkað til at umfevna ein part av avlopinum í landskassanum. Í 2018 varð inntøkugrundarlagið víðkað upp aftur meira við inntøkum frá fiskivinnugjøldum. Nýggja landsstýrið heldur fram við at uppbyggja ognina hjá grunninum, sum við árslok 2022 var ein góð mia. kr.

Forsætisráðfrúgvin og løgmaður gjørdu 17. januar 2024 eina endamálsfráboðan um at avhenda Íløgugrunnin fyri Føroyar. Grunnurin, sum er stovnaður við lóg 1964, hevur m.a. til endamáls at veita lán til íløgur í stóra almenna nýgerð, sum er neyðug fyri føroysku vinnulívsmenningina, og har tað ikki í nóg stóran mun er gjørligt at útvega fígging á annan hátt. Ognirnar hjá Íløgugrunninum vóru 653 mió. kr. við árslok 2022. Roynt verður at avhenda grunnin til Føroya 1. januar 2025.

*Almenn fígging*

Ætlan er um javnvág á fíggjarlógini fyri 2024 (FL24), *sambært talvu 1.*

**Talva 1. Landskassin, rakstrar-, løgu- og útlánsfíggjarætlan (RLU), 2018-2024. mió. kr.**

| | **Ú 2018** | **Ú 2019** | **Ú 2020** | **Ú 2021** | **Ú 2022** | **Met-ing 2023** | **FL 2024** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøka í alt | 5.479 | 5.853 | 5.762 | 6.325 | 6.715 | 6.950 | 7.300 |
| - Ríkisstuðul | 642 | 642 | 642 | 642 | 642 | 617 | 592 |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 4.765 | 4.970 | 5.538 | 5.737 | 6.033 | 6.350 | 6.737 |
| Løguútreiðslur | 442 | 454 | 515 | 451 | 488 | 725 | 559 |
| **RLU-javni** | **272** | **428** | **-291** | **138** | **195** | **-125** | **4** |
| Serstakar inntøkur[1] | 301 | -144 | -7 | 75 | -164 | -200 | -294 |
| RLÚ írokn. serst. innt. | 573 | 284 | -298 | 212 | 31 | -325 | -290 |

[1]. Í juni 2018 fyrnaðist eitt ríkislán upp á 500 mió. kr., tí Føroyar ikki, áðrenn ta tíð hevði havt inntøkur frá olijuútvinning, *smb. avtalu 10. juni 1998 millum stjórnina og landsstýrið.*
Kelda: Fíggjarmálaráðið í Føroyum.

Á FL24 er m.a. lønarlyfting raðfest til tey lægst løntu á umsorganarøkinum, hægri mark fyri mótrokning í eftirlønum, hægri játtan til fólkaskúlarnar og heilsuverkið, føroyska náttúrufyrisiting, føroyska umboðan í USA og at yvirtaka vitaverkið. Harafturat er skattumskipan framd fyri serliga lág- og miðinntøkur, so tað betri lønar seg at arbeiða. Umskipanin verður m.a. fíggjað við øktum grønum gjøldum.

Tjóðbankin gav gætur m.a. í seinastu greiningini av føroyska búskapinum, at tað hóast fleiri góð ár í føroyskum búskapi hevur tað ikki verið stórvegis avlop á almenna javnanum, og tað er heldur ikki væntandi komandi árini. Almenni geirin er við tí við til at økja uppgongdina í einum tíðarskeiði, har privati eftirspurningurin er stórur, heldur enn at vera við til at fremja eina meira treysta uppgongd. At almenna fíggjanin ikki í nóg stóran mun hevur tikið seg fram undir uppgongdini merkir, at neyðugar tillagingar verða freistaðar, og vandi verður fyri neyðugum ítáttingum undir niðurgongd. Fólkafrøðiligu avbjóðingarnar komandi árini  leggja dent á tørvin fyri, at farið verður undir kendar avbjóðingar, og at tað samstundis verður spart upp í góðum tíðum, so tað er búskaparligt rásarúm til at styðja upp undir búskapin í afturgongdstíðum.

Ríkisveitingin til Føroya hevur í tíðarskeiðnum 2015-2022 verið formliga óbroytt upp á 641,8 mió. kr. árlig. Tað hevur í royndum verið ein skerjing í tíðarskeiðnum. Landsstýrið vil hava, at ríkisveitingin formliga minkar við 25 mió. kr. árliga í tíðarskeiðnum 2023-2026. Ríkisveitingin verður væntað at verða 8 % av heildarinntøkunum hjá landskassanum 2024.

Bruttoskundin hjá Landskassanum var 3,9 mia. kr. ella sløk 15 % af BTÚ við árslok 2023. Landskassin hevur nú eitt gjaldføri í Landsbankanum upp á 4,1 mia. kr., og Føroyar hava sostatt eina nettoogn upp á 0,2 mia. kr. Viðmerkjast skal, at peningurin í Búskapargrunni Føroya er uppi í tøka tiltakspeninginum. Skuldarstigið er alheimsliga sæð lágt, og rentan á skuldini er lág.

Alheimsliga lánsmetingin hjá Føroyum hevur síðani 2019 verið á stignum Aa2 við treystum útlitum. Í seinastu metingini frá august 2023 viðmerkti Moody´s, at ein hægri styrkismeting m.a. er treytað av einum breiðari vinnulívsgrundlag, ið er minni treytað av fiskivinnuni. Ein lægri styrkismeting kann mótsett verða veruleiki, um m.a. sambandið við Danmark viknar. Dentur verður lagdur á í metingini, at støðuga sambandið við Danmark vektar jaliga, og at búskaparligur stuðul frá Danmark verður hildin sera sannlíkur, um gjaldførisavbjóðingar skuldu borið á. Føroyar hava ábyrgdina av búskaparpolitikkinum og avgera sjálvar, hvussu almenna fíggjarætlanin verður fíggjað.

*Príslagsgongdin*

Hagstova Føroya  hevur  2023 á fyrsta sinni almannakunngjørt tøl fyri BTÚ hjá Føroyum í føstum prísum fyrr tíðarskeiðið 2008-2022. Higartil hava einans verið uppgjørd tøl í ársins prísum. Uppgerðin vísir, at føroyski búskapurin hevur verið í munandi framgongd síðani 2011 við einum vøkstri í BTÚ í føstum prísum upp á góð 3½ % árliga í miðal. Í 2020 fall búskaparliga virksemið stutta tíð í sambandi við korona-kreppuna, men vøksturin øktist skjótt aftur og var 5,4 % i 2022.

Ráðið metir í seinastu frágreiðingini, at formliga BTÚ vaks við sløkum 6 % í 2023 og væntar ein vøkstur upp á 1½ % 2024. Metingin hjá Ráðnum er bert tøkt í leypandi prísum, men væntandi fer Ráðið í komandi frágreiðingum eisini at gera metingar í føstum prísum.

Framgongdin í búskapinum endurspeglast týðiliga í arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsfjøldin hevur verið vaksandi eitt langt áramál og var sløk 28.750 fólk í desember 2023. Meira enn 80 % av íbúgvunum í aldrinum 15-66 ár eru í arbeiði, sum er millum tey hægstu í Evropa. Arbeiðsloysið hevur síðani juni 2022 verið upp á um 0,7 %, og tað er soleiðis í veruleikanum arbeiði til allar hendur. Framgongdin á arbeiðsmarknaðinum seinastu árini kemur í stóran mun av  tilgongd av útlendskari arbeiðsmegi.

Ráðið metir, at avmarkaða tøka tilfeingið á arbeiðsmarknaðinum er ein stór forðan fyri framhaldandi stórari búskaparligari framgongd.

Økingin í brúkaraprísunum í Føroyum er minkað frá góðum 10 % í 2. ársfjórðingi 2022 til 2,8 % í 4. ársfjórðingi 2023. Serliga prísgongdin á innfluttum matvørum og olju umframt íbúðarútreiðslur hava viðvirkað til inflatiónina.

Fiskiskapur og fiskaaling eru rakstrarmegin í føroyska búskapinum, og fiskaútflutningurin er sløk 95 % av vøruútflutninginum. Búskaparliga framgongdin hevur serliga støði í øktari veiðu í uppsjóvarfiskiskapinum (makrelur, svartkjaftur og sild) og størri nøgdum av laksi úr fiskaalingini. Fiskivinnan hevur samstundis seinastu árini verið notið væl av sera høgum útflutningsprísum. Tað speglast eisini í einum søguliga høgum stigi hjá vøruútflutninginum, ið var 9,5 mia. kr. Trimum fyrstu ársfjórðingunum av 2023 ella sløk 40 % meira enn í sama tíðarskeiði fyri tveimum árum síðani.

Íbúðarprísirnir í Føroyum eru gjøgnum nøkur ár hækkaðir stórliga. Gongdin hevur m.a. verið rikin av hægri inntøkum, lágum rentustigi og øktari arbeiðsmegi uttanífrá. Íbúðaútboðið er samstundis ikki fylgt við uppgongdini. Tekin var í 2023 um bremsing í íbúðaprísunum. Inflatiónin hevur holað burtur úr reallønini hjá húsarhaldunum, og renturnar eru hækkaðar. Flestu íbúðaeigarar hava broytiliga rentað lán, og hægri rentur fáa tí skjótt árin.

Føroysku bankarnir hava sambært Tjóðbankanum uppbygt fæfeingi síðani 2017, og frástøðan til váðagrundaðu fæfeingiskrøvini eru soleiðis nakað hægri enn áður. Saman við øktari vinnu styrkir tað mótstøðumegina hjá bankunum, um kreppa rakar búskapin.

Íbúgvatalið í Føroyum er síðani byrjanina av búskaparligu uppgongdini 2011 vaksið við góðum 6.400 fólkum ella 13 % og var 54.547 1. desember 2023.

## 1.2 Løgmálaøkið í Føroyum

Rætturin í Føroyum og Føroya Politi hava 2023 fingið játtað pening til at rúgvugreiða revsimál løgd fyri Rættin í Føroyum. Hesin peningur er m.a. nýttur til ákærahjálp frá donskum økjum.

Føroya Politi hevur í dag ikki atgongd til málsstýringarskipanina hjá politinum, POLSAS. POLSAS-verksetingin í Føroya Politi skal bøta um málsviðgerðarloysingina og undirstuðla einsháttaða málsviðgerð tvørtur um ríkisfelagsskapin. Verksetingin fer væntandi í gongd 2024. Harafturat arbeiðir Føroya Politi við at gera eina nýggja innandura skotbreyt, sum verður væntað tikin í nýtslu 2024.

Kriminalforsorgin hevur 2023 stovnað eitt innanstovnsligt sálarfrøðingalið, sum styðjar Føroyar við m.a. ráðgeving, eftirkunning, stuðli til leiðsluna í Føroyum við at menna ítøkilig tiltak til at fyribyrgja PTSD og aðrar sálarligar løðsluandgerðir. Kriminalforsorgin har 2023 arbeitt við at bøta um viðurskiftini í varðhaldinum í Føroyum, undir hesum arbeiðsmøguleikarnar hjá teimum innsettu. Harafturat er møguleikin at seta revsing í egnum bústaði við ravtøkniligum fótfjøtri í verk fingin í ljósmála. Uppkastið til lógaruppskot hjá Løgmálaráðnum um at seta fótfjøturskipan í verk hevur verið viðgjørt á Løgtingi á heysti 2023 og verður væntandi løgd fyri Fólkatingið fyrst í 2024. Kriminalforsorgin har harafturat fingið samrøðu í lag við privatan vinnurekandi í Føroyum um at fáa útslúsingarfongsulslík pláss í lag. Á vári 2023 varð samstarvsavtala fingin í lag millum

Kriminalforsorgina og Almannaverkið, ið hevur til endamáls at styrkja myndugleikasamstarvið um teir føroyingar, ið eru í stovnunum hjá Kriminalforsorgini í Danmark.

Stjórnin og Føroya landsstýri gjørdu 7. juni 2022 ætlanar-kunngerð um at gera nýtt fongsul í Føroyum. Sambært stjórnarsamgonguskjalinum verður arbeitt fram ímóti, at eitt nýtt fongsul kann verða gjørt 2029. Ráðleggingarskeiðið við at gera byggiskrá, sum er í gongd, gongur til mitt í 2024. Samstundis fer greining fram um ítøkilig uppskot til at staðseta fongslið í samskifti við Føroya landsstýri.

*Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf mv.* [Lóg fyri Føroyar um revsingarfullgerð o.a.] kom í gildi 1. juli 2023. Sambært heimildarviðtøkunum í lógini eru nakrar kunngerðir o.a. lýstar.

1. september 2023 kom ein løgskipan við broytingum í *konkursloven* [fíggjartrotslógini] í gildi saman við nøkrum lógarbroytingum tongdum at hesum.

22. november 2023 gjørdu stjórnin og allir flokkar á Fólka-tingi eina fleiráraavtalu um búskapin hjá dómstólunum fyri 2024-2027. Settar eru í avtalutíðarskeiðnum 8,7 mió. kr. av til framtak viðvíkjandi Føroyum. Avtalan hevur m.a. sett pening av til tøkniliga greining av møguleikanum fyri at bøta um KT-styðjanina undir revsi- og skiftirættarøkini.

### 1.3 Útlendingaøkið í Føroyum

Stjórnin fer í 1. ársfjórðingi 2024 í samstarvi við føroysku myndugleikarnar at taka stig til at dagføra ríkisborgara-rættarlóggávuna í Føroyum. Seinasta lógarbroyting á ríkisborgararættarøkinum, ið er dagførd í Føroyum, er frá desember 2016.

Eftir føroyskum ynski setti Útlendinga- og Tillagingarmálaráðið 2. september 2023 í gildi eitt nýtt sjálvsuppihaldskrav fyri uppihaldsloyvi sum viðfylgjandi húski hjá útlendskir arbeiðstakarar og sjálvstøðug vinnurekandi í Føroyum.

Í 2024 fer Útlendinga- og Tillagingarmálaráðið eftir ynski frá og í samstarvi við Føroya landsstýri undir at smíða eina nýggja útlendingalóg fyri Føroyar.

### 1.4 Málsøkjayvirtøka

Føroya landsstýri vil yvirtaka málsøkini flogferðsla og sjórættur, umframt fyrireika yvirtøku av landslæknaembætinum. Løgtingið samtykti á vári 2023 at yvirtaka farsóttarøkið 1. januar 2024, umframt siglingarleiða-uppmerking og vitaverk 1. juni 2024. Í sambandi við yvirtøkuna av farsóttarøkinum er samstarvsavtala gjørd millum Innanríkis- og Heilsumálaráðið í Danmark og Heilsumálaráðið í Føroyum.

## 2. GRØNLAND

### 2.1 Búskapur Grønlands

*Búskapur Grønlands hevur verið í framgongd síðani 2015, og er komin væl ígjøgnum alheimskreppurnar seinastu árini. Arbeiðsloysið er søguliga lágt, og tað er framhaldandi trýst á arbeiðsmarknaðin. Ætlandi munandi avlop á fíggjarætlanunum komandi árini, sum eisini skal síggjast saman við stóru fíggjarpolitisku haldførisavbjóðingunum, sum Grønland stendur framman fyri í framtíðini.*

*Fíggjarpolitiskt haldføri o.a.*

Naalakkersuisut framlegði 17. november 2023 Haldføris- og Vakstrarætlan 2, sum vísir á møguligar vegir til haldføra búskaparliga menning í Grønlandi fram móti 2040-2050. Búskaparliga menningin í Grønlandi fer næstu tíggjuni at verða merkt av færri arbeiðstakarum og minni arbeiðsfjøld. Tað verða færri ung og fólk í arbeiðsvirkna aldrinum, meðan tað gerast fleiri eld, sum liva longri. Tað hevur stórt trýst á almenn fíggjarmál við sær.

Grønlendska búskaparráðið (Ráðið) framlegði á heysti 2022 eina dagførda útrokning av fíggjarpolitiska haldførinum, ið framhaldandi vísir, at almennu útreiðslurnar fara at renna frá inntøkunum, og hallið í almennu fíggjarmálunum fer gjøgnum árini at økjast upp á eitt sera høgt stig. Fíggjarpolitikkurin er ikki haldførur. Sambært útrokningunum fer hallið í almennum fíggjarmálum at verða um ½ mia. kr. 2030 og vaksa upp aftur meira til yvir 1 mia. kr. árliga frá miðjum 2030-árum. Stórur tørvur er soleiðis á broytingum og nýggjum inntøkum fyri at framtíðartryggja almennu fíggjarmálini.

Í Haldføris- og Vakstrarætlan 2 verður gjørt grein á fleiri av týdningarmestu avbjóðingunum hjá grønlendska búskapinum, undir hesum á útbúgvingarøkinum og arbeiðs-marknaðinum. Hesin parturin av ætlanini er grundaður á undanfarnum greiningum frá m.a. Skatta- og Vælferðarnevndini (2011) og Ráðnum.

Í Grønlandi verður stórt tilfeingi nýtt í sambandi við útbúgvingarøkið, og fleiri gera seg liðug við útbúgvingar enn áður, men enn er stórir ónýttir møguleikar at hækka útbúgvingarstigið og økja arbeiðsfjøldina. 2022 hevði 41 % av fólkatalinum í aldrinum 16-74 ár eina útbúgving umframt, meðan 30 % av teimum ungu í aldrinum 16-25 ár, hvørki vóru undir útbúgving ella í arbeiði. Mong ung fara ikki undir eina útbúgving ella byrja seint, og fleiri falla frá. Ráðið hevur fyrr víst á, at tað er umráðandi, at útbúgvingastigið hækkar, og at fleiri fáa eina førleikaveitandi útbúgving eftir fólkaskúlan. Útbúgving hevur hægri inntøku við sær og freistar afturtøkuna av arbeiðsmarknaðinum. Tað styrkir framgongdina og haldførið í búskapinum. Naalakkersuisut er m.a. farið undir arbeiðið við eini nýggjari útbúgvingarætlan, sum skal loysa mangar av avbjóðingunum, og hækking av útbúgvingar- og førleikastignum er broytingarspor 1 av í alt fýra broytingarsporum í Haldføris- og Vakstrarætlan 2.

Arbeiðsmarknaðurin í Grønlandi hevur bága av troti á bæði ikki yrkislærdari og útbúnaðari arbeiðsmegi. Øll, ið hava arbeiðsmarknaðarviðkomandi førleikar, hava arbeiði, og samstundis hevur tað seinastu árini verið munandi starvs-setan av ikki yrkislærdari arbeiðsmegi frá serliga asiatiskum londum. Tað er m.a. orsakað av mishóvan- og áeggjanar-trupulleikum og landafrøðiligum forðingum fyri flytføri.

Broytingarspor 2 í Haldføris- og Vakstrarætlanini miðjar m.a. eftir at skapa ein meira umskiftiligan arbeiðsmarknaða. Dentur verður lagdur á at lætta um atgongdina til arbeiðsmegi gjøgnum eitt økt arbeiðsútboð, og tað er eisini dentur lagdur á at økja yrkisliga og landafrøðiliga flytførið á arbeiðsmarknaðinum. Broytingarspor 2 er harafturat samansett av átøkum beindum móti at skapa nýggjan vinnulívsligan vøkstur og umlegging til margstreingjaðan búskap. Økt privat vinna og økt inntøka frá skattum og gjøldum kunnu vera við til at gera búskapin haldførari. Ein meira margstreingjaður búskapur fer samstundis at kunna verða við til ein betri javnvigaðan búskap, har tað er minni váði í mun til gongdina í einstøkum geirum. Tað er í hesum broytingarspori eisini dentur lagdur á á inntøkur frá tilfeingisgjøldum á at troyta náttúrutilfeingi, betri skipan av pørtum av

fiskiskapinum, eina nýggja ferðavinnuætlan, menning av ráevnaøkinum og at troyta vatnorkumøguleikar á orkuøkinum.

Týdningarmesta privata vinnan í Grønlandi í mun til arbeiðsfjøldina, virðisskapan og útflutning er fiskivinnan, sum eisini hevur stóra týdning fyri inntøkurnar hjá landskassanum. Tilfeingisgjøld frá fiskivinnuni vóru sløk 0,5 mia. kr. 2022. Í september 2021 framlegði Fiskivinnunevndin nøkur uppskot til broytingar, og Naalakkersuisut hevur í november 2023 sent uppskot til Inatsisartut-lóg um fiskivinnu til ummælis. Ráðið hevur varnast, at tað er týdningarmikið, at tað tilmælini hjá nevndini ikki verða slept fyri at tryggja eina burðardyggari fiskivinnu og størri samfelagsbúskaparliga úrtøku.

Naalakkersusiut hevur sett í gongd eitt arbeiði við nýggjari langskygdari ferðavinnuætlan fyri 2025-2035. Ferðavinna er í løtuni bara ein lítil partur av grønlendska búskapinum, men hevur stórar vinnumøguleikar, sum tó eisini krevja nógva virksama orku. Gistingarhústilfeingið er í løtuni trýst hóast tilfeingisvíðkanir seinastu árini, og arbeiðsmegi trýtur. Nýggju atlantsfloghavnirnar i Nuuk og Ilulissat lata ætlandi upp ávikavist seinast í 2024 og í 2025 og ætlast at vera við til vinnumenning, herímillum ferðavinnu. Sjálvstýrið eigur tveir triðjapartar av floghavnunum, meðan ríkið eigur ein triðjapart. Ríkið er umframt eigarapart uppi í við endurútláni og trygd á einum láni í Norðurlendska Íleggingarbankanum. Ríkið er soleiðis við til at økja fíggjarliga reystleikan hjá verkætlanini og minkar rentu-útreiðslur og váða fyri sjálvstýrið.

Eftirlitið við yvirflúgvandi flogferðslu í Grønlandi í ovara loftøkinum røkja í dag ávikavist Kanada og Ísland. Naalakkersuisut vil hava, at tað verður arbeitt fyri, at loftferðslurøktin yvir Grønlandi í fullan mun fer fram í Grønland frá 2031 við, at ein eftirlitsmiðstøð verður gjørd í Grønlandi. Loftferðslueftirlitið verður væntað at kunna skapa sløk 100 nýggj arbeiðspláss.

Ráevnaøkið er eisini eitt dentøki hjá Naalakkersuisut at útvega nýggj arbeiðspláss og inntøkur. Mineralmøguleikar eru í Grønlandi, og seinastu árini hevur verið nógv í væntu, men enn eingin námsrakstur av samfelagsbúskaparligum týdning.

Naalakkersuisut fekk í heystsetuni 2021 heimild til at taka lán til nýggjar vatnorkuverkætlanir við Nuuk og Qasigiannguit/Aasiaat. Verkætlanirnar fara at økja partin av varandi orku í almennu veitingini fra um 70 % til sløk 90 % Vatnorkuætlanirnar eru búskaparliga sera stórar í vavi í mun til grønlendska búskapin og krevur stóra lántøku. Í ætlanar-kunngerðini frá 15. mars 2022 millum stjórnina og Naalakkersuisut er skrivað, at tað skal fáast í ljósmálan, um – og um so er, hvussu – Danmark kann vera við til at fíggja verkætlanirnar. Tað er væntað, at útreiðslurnar til verk-ætlanirnar fara at verða 4,1 mia. kr. Arbeiðið við at fáa møguligt danskt fíggjaríkast í ljósmála fer enn fram í samstarvi millum Fíggjarmálaráðið og Sjálvstýri Grønlands, og tað er í januar 2024 gjørd avtala um styrkt samstarv um at greina fíggjan av vatnorkuverkætlanirnar.

Broytingarspor 3 í Haldføris- og Vakstrarætlanini snýr seg um at framtíðartryggja almenna geiran. Aðaltátturin í broytingarsporinum eru tær fíggjaravmarkingar, ið eru settar inn í fíggjar- og roknskaparlógina, sum seinast varð broytt 2021. Fíggjar- og roknskaparlógin ber m.a. í sær, at heildarjáttanirnar til rakstur, stuðul og bygging á fíggjarlógini í mesta lagi má hava ein realvøkstur upp á 1 % í eitt ár og í mesta lagi ein heildarrealvøkstur upp á 2 % gjøgnum fýra ár. Samstundis er krav um fíggjarjavnvág ella avlop fyri sjálvstýrið og einstøku kommunurnar sæð gjøgnum eitt fýra ára skeið. Loftið yvir realvøkstrinum í almennu útreiðslunum herða áeggjanirnar hjá sjálvstýrinum og kommununum til virknisgerðir og at økja framleiðnið. Fíggjar- og roknskaparlógin hevur harafturat

ásetingar um at handfara serstakar inntøkur í landskassanum, so tær ikki hava økingar í almennu rakstrarútreiðslunum við sær. Fíggjar- og roknskaparlógin inniheldur harafturat mál og grundreglur um at stýra lántøku, undir tí, at almenni geirin einans kann taka lán, ið eru við til at bøta um fíggjarpolitiska haldførið.

Broytingarspor 4 í Haldføris- og Vakstraræltanini snýr seg um at broyta skattaskipanina, vælferðarveitingar umframt íbúðar- og eldraøkið. Høvuðsdenturin er her at framtíðartryggja eftirlønarskipanina, so hon gerst mótstøðuførari og alment javnvigað. Ítøkiliga eru í ætlanini ætlanir um at indeksera eftirlønaraldurin, so hann økist við ¾ ári, tá rest-æviskeiðið leingist við einum ári. Sum er er eftirlønaraldurin 67 ár. Við uppskotnu indekseringini fer eftirlønaraldurin við verandi væntaðu gongd í restæviskeiði at verða 67¾ ár 2038 og 68½ ár 2046.

Tað at fremja ítøkiligu broytingarnar og framtakini í teimum fýra broytingarsporunum fer sambært Haldføris- og Vakstrarætlan 2 at verða við til at gera til einkis munin millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar og tryggja haldføra almenna fígging í framtíðini.

*Almenn fígging*

Fíggjarlógin fyri 2024 (FL24) er løgd innan karmarnar av fíggjar- og roknskaparlógini, og ætlanin er, at avlop skal verða á rakstrar- og verklagsjavnanum (RV) upp á 284 mió. kr. ella góð 1¼ % af BTÚ 2024, *samb. talvu 2*.

**Talva 2. Landskassin, rakstrar- og verklagsfíggjarætlan (RV), 2021-2027. Mió. kr.**

| | Ú | Ú | FL | FL | Meting | Meting | Meting |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 |
| Inntøkur í alt | 7.169 | 7.628 | 7.623 | 8.183 | 8.252 | 8.270 | 8.295 |
| - Ríkisveiting | 3.943 | 3.986 | 4.142 | 4.324 | 4.324 | 4.324 | 4.324 |
| Rakstrarútreiðlur o.a. | 6.812 | 6.983 | 7.136 | 7.383 | 7.384 | 7.352 | 7.350 |
| Løguútreiðslur | 496 | 522 | 4715 | 508 | 541 | 559 | 616 |
| RLU-javni | -140 | 123 | 16 | 291 | 327 | 359 | 330 |
| **RV-javni** | **-150** | **113** | **6** | **284** | **317** | **349** | **320** |

*Kelda: Sjálvstýri Grønlands. Fíggjarlóg fyri 2024.*

[1]. Í juni 2018 fyrnaðist eitt ríkislán upp á 500 mió. kr., tí Føroyar ikki, áðrenn ta tíð hevði havt inntøkur frá olijuútvinning, *smb. avtalu 10. juni 1998 millum stjórnina og landsstýrið.*
Kelda: Fíggjarmálaráðið í Føroyum.

Vaksandi inntøkur frá skattum og útreiðslum hava við sær saman við útreiðsluavmarkingunum í fíggjar- og roknskaparlógini, at FL24 hevur munandi avlop upp á 1,3 mia. kr. í tíðarskeiðnum 2024-2027. Skrivað er í fíggjarlógar-avtaluni fyri 2024, at væntaða avlopið ikki má bera upp fyri, at fólkafrøðiligu broytingarnar árini efter 2027 so líðandi hava við sær, at almenni búskapurin stórliga versnar. Tað at halda avmarkingarnar í fíggjar- og roknskaparlógini viðvíkjandi útreiðslugongdini kunnu og skulu geva eitt týdningarmikið íkast til at ganga hesi gongd á møti.

Á FL24 er tað m.a. raðfest at styrkja búskaparliga rammuna á heilsuøkinum áðrenn eina komandi heilsusemju. Heilsu-nevndin almannakunngjørdi 22. mai 2023 sítt álit, har tað m.a. verður sagt, at heilsuverkið er sera trýst á øllum mótum: Starvsfólk, búskapur, yrkislig menning, tilfeingistroyting o.a. Trýstið fer at økjast orsakað av fólkafrøðiligu broytingunum. Samstundis er stórur íleggingartørvur í sambandi við bygningar og nýggja skipan til sjúklingadagbøkur. Dentur er í FL24 eisini á m.a. ábøtur

á korini hjá fosturhúskjum og á onnur almanna- og eldrapolitisk tiltøk, ein meira javna menning av landinum, við tí spreiðing av verklagsvirksemi og tilsjón at undirstøðukervi umframt útbúgvingar- og førleikamenningarátøkum fyri at økja arbeiðsmøguleikarnar.

Ríkisveitingin til Grønland er 4,3 mia. kr. 2024 ella góður helmingurin av inntøkum landskassans. Ríkið røkir harumframt 30 málsøki, sum sjálvstýrið kann yvirtaka. Økini umfevna m.a. fíggjarlig viðurskifti, politi, rættarverk og kriminalforsorgina. Útreiðslur til øki, ið kunnu yvirtakast, eru ætlandi yvir ½ mia. kr. árliga fyri ríkið. Ríkismyndugleikarnir røkja eisini øki, sum ikki kunnu yvirtakast innan grundlógarrammurnar. Tað geldur m.a. uttanríkis-, trygdar- og verjupolitik. Á verjuøkinum nýtir Danmark yvir ½ mia. kr. árliga í Grønlandi. Upphæddin hækkar uppaftur meira við Arktis-styrkispakka, eins og  komandi verjusemjan eisini væntast at hava øktar ríkisligar útreiðslur við sær.

Sjálvstýrið, kommunurnar og feløgini hjá sjálvstýrinum høvdu 2022 eina rentuberandi heildarskuld upp á 7,3 mia. kr. ella 35 % av BTÚ, meðan nettoskuldin var 4,0 mia. kr. ella 19 % af BTÚ, sum alheimsliga er lágt. Skuldin er í feløgunum, sum sjálvstýrið eigur, meðan landskassin hevur eina nettoogn upp á um 1 mia. kr. Rentuberandi skuldin er økt munandi seinastu árini samstundis sum íløgur eru gjørdar í feløg hjá sjálvstýrinum og floghavnaverkætlanirnar í Nuuk og Ilulissat, og hon væntast at økjast til slakar 9,2 mia. kr. 2026 m.a. orsakað av væntaðari lántøku til vatnorkuverkætlanirnar.

Í januar 2024 er avtala gjørd millum Sjálvstýri Grønlands, Danmarkar ríki og KommuneKredit, sum geva grønlendskum kommunum møguleika at taka lán í KommuneKredit í tíðarskeiðnum 2024-2031 við støði í trygd frá sjálvstýrinum og ríkinum. Heildarliga lániramman er 4,0 mia. kr. Lániatgongdin gevur kommununum møguleika at lække teirra fíggingarkostnaða til íløgur í m.a. undirstøðukervi-, verklags- og vinnuverkætlanir.

Grønland hevur ábyrgdina av búskaparpolitikkinum og avger sjálvt, hvussu almenna fíggjarætlanin verður fíggjað.

*Príslagsgongd*

Grønlendski búskapurin hevur verið í framgongd síðani 2015 og er komin væl ígjøgnum seinastu trý árini við alheimsfarsótt, krígnum í Ukraina og orkukreppu. Framgongdin stavar serliga frá góðum tíðum í fiskivinnuni og stóru byggi- og verklagsíløgunum í floghavnir og annað undirstøðukervi, sum hevur hildið virkseminum uppi. Ferðavinnan er samstundis komin stórliga aftur efter, at ferðaavmarkingarnar eru avtiknar. Ráðið metir, at tað 2022 var vøkstur í BTÚ í føstum prísum upp á 2,1 %, *samb. talvu 3*.

**Talva 3. Veitingarjavnin 2019-2024. Arligur realvøkstur í %**

| | Partur av BTÚ 2021 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Privat nýtsla | 35,8 | 0,5 | 0,4 | 3,2 | 1,6 | 1,6 | 1,1 |
| Almenn nýtsla | 45,1 | 4,0 | -1,8 | 1,4 | 0,5 | 0,5 | 0,5 |
| Bruttoíløgur | 33,3 | 46,9 | 0,4 | 6,5 | -12,6 | 2,5 | -4,3 |
| Vøru- og tænastuútflutningur | 35,4 | -5,4 | -5,6 | 0,7 | 4,0 | 1,5 | -1,0 |
| Tilgongd/endalig nýtsla | 149,7 | 7,9 | -1,9 | 2,7 | -1,5 | 1,4 | -0,7 |
| Vøru- og tænastuinnflutningur | 49,7 | 15,1 | -5,8 | 5,9 | -7,2 | 0,5 | -3,0 |
| Bruttotjóðarúrtøka (BTÚ) | 100,0 | 2,8 | 0,2 | 1,3 | 2,1 | 2,0 | 0,6 |

*Kelda: Grønlands Statistik. 2020-2021 eru fyribils tøl. 2022-2024 eru metingar frá Búskaparráði Grønlands frá januar 2024. BTÚ er fyribils uppgjørt til 20,3 mia. kr. 2021.*

Gongdin í búskapinum sæst aftur í arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsloysið hevur verið minkandi nøkur ár og sambært Ráðnum kann vera komið niður á 2 % 2023. Tað er søguliga lágt og hevur havt øktan tørv á útlendskari arbeiðsmegi við sær. Tó eru stórir munir millum landspartarnar enn. Trýstið á arbeiðsmarknaðin er stórt í Nuuk, meðan tað enn er stórt arbeiðsloysi á Eysturstrondini og í Suðurgrønlandi, har búskaparliga menningin er nógv veikari. Arbeiðsloysið er har serliga treytað av bygnaðarligum viðurskiftum. Ráðið metir, at ein loysn á arbeiðsorkutrupulleikanum fer at verða største búskaparliga avbjóðingin í Grønlandi komandi árini.

Inflatiónin hækkar, men er lág enn í mun til mong onnur lond. Orkuveitingin, sum í stóran mun stavar frá vatnorkuverkum og oljuframleiddum brennievni við prístrygdaravtalum, var við til, at brúkaraprísirnir einans hækkaðu við 2,7 % 2022. Ráðið væntar, at inflatiónin fyri alt tíðarskeiðið 2023-2024 kann verða upp á um 7 %. Tað er við lutfalsliga stórum innflutningi ikki gjørligt at avbyrgja Grønland púrasta frá alheimsinflatiónini.

Ráðið metir eina øking í BTÚ í føstum prísum upp á 2 % fara at verða 2023 og um ½ % 2024. Búskaparliga virknið fer væntandi at minka í forsagnartíðarskeiðnum so hvørt sum veiðunøgdirnar í fiskivinnuni tykjast at steðga á, og íløgurnar í undirstøðukervi eru hægst. Samstundis kunnu høgu renturnar tálma privatu íløgurnar, og príshækkingar minka um keypiorkuna og við tí privatnýtsluna. Almenna nýtslan fer væntandi at hækka hóvliga í samsvar við fíggjar- og roknskarlógina.

Íbúgvaratalið í Grønlandi var 56.696 1. oktober 2023. Tað hevur yvirhøvur verið óbroytt í mong ár. Í Nuuk er fólkatalið vaksið við 333 síðani 1. oktober 2022, og har búgva nú 19.866 ella ein triðjapartur av íbúgvunum. Í 2023 búðu 17.067 fólk í Danmark, sum eru fødd í Grønlandi. Ein fjórðapartur av teimum, ið eru fødd í Grønlandi búgva sostatt í Danmark.

## 2.2 Søgulig frágreiðing um viðurskiftini millum Danmark og Grønland, og um snyrlamálið

Naalakkersuisut og stjórnin gjørdu 22. juni 2023 avtalu um uppgávusetning í sambandi við søguliga frágreiðing um viðurskiftini millum Grønland og Danmark sum framhaldsviðgerð av felags yvirlýsing hjá Naalakkersuisut og stjórnini hesum viðvíkjandi frá 9. juni 2022. Frágreiðingin skal snúgva seg um týdningarmestu politisku avgerðir, hendingar og viðurskifti annars, gerðir og gongdir, sum vóru við til at merkja menningina av Grønlandi, viðurskiftini millum Grønland og Danmark, ella sum fingu avleiðingar fyri grønlendska fólkið frá 1945 og higartil. Danmark veitir eina heildarfígging upp á 45

mió. kr. til frágreiðingina, sum væntandi fer at taka um fimm ár. Arbeiðið við søguligu frágreiðingini verður grundfest í Ilisimatusarfik (Fróðskaparsetur Grønlands).

Naalakkersuisut og stjórnin gjørdu í september 2022 avtalu um at gera eina óhefta frágreiðing um sonevnda snyrlamálið. Grønlendskar kvinnur og ungar gentur fingu frá 1960'unum og frameftir gitnaðarfyribyrgjandi snyril uppsettan. Tað galt eisini grønlendskar næmingar, ið vóru í Danmark m.a. í eftirskúlum. Frágreiðingin skal fáa í ljósmála søguliga samanhangið í hesum gerðum fram til og við 1991, har Grønland yvirtók heilsuøkið, avgerðar-gongdina og útinnanina hesum viðvíkjandi. Harafturat skal hon fáa í ljósmála rættarliga, heilsuyrkisliga og fyrisitingarliga grundlagið fyri at uppseta snyrlar tá á døgum. Óhefta frágreiðingin varð sett í gongd 30. mai 2023 og er væntandi liðug í mai 2025.

## 2.3 Styrkt átak viðvíkjandi meinkaðum børnum og ungum í Grønlandi

Arbeiðið við at verkseta tey 16 tilmælini frá 2020-frágreiðingini um grønlendska-danska tvørturumgongda arbeiðið fyri styrktum átaki viðvíkjandi meinkaðum børnum og ungum í Grønlandi helt fram í 2023, og fleiri av átøkunum eru framd.

Við avtaluni um at brúka av tiltaksgoymsluni viðvíkjandi almanna-, heilsu- og arbeiðsmarknaðarøkið fyri 2024-2027 varð givin heildarveiting upp á 18 mió. kr. árini 2024-2026 til at undirstyðja styrkta átakið viðvíkjandi meinkaðum børnum og ungum í Grønlandi.

Við barnsins lóg, ið kom í gildi 1. januar 2024, er gjørdur møguleiki fyri, at yrkispersónar í Danmark kunnu geva myndugleikum í Grønlandi boð, um yrkispersónarnir halda okkurt vera áfatt við barni ella ungum fólki, ið er í Grønlandi.

## 2.4 Sosialt meinkaðir grønlendingar í Danmark

Mett verður, at 1.000 - 1.500 sosialt meinkaðir grønlendingar eru í Danmark.

Í avtalu um at brúka av tiltaksgoymsluni viðvíkjandi almanna-, heilsu- og arbeiðsmarknaðarøkið fyri 2024-2027 vórðu latnar 7,8 mió. kr. til at styrkja málsviðgerðina og samstarvið í barnamálum við grønlendskum húskjum í donskum kommunum, undir hesum at tillaga og umseta sálarfrøðiligar royndir, upplýsingartilfar á grønlendskum til foreldur og børn umframt til eitt ráðgevingartoymi grundfest í Foreningen Grønlandske Børn. Komið er fram, at framtakið ikki kann fullgerast innan fyri ásetta tíðarkarmin. Við avtaluni um áður nevndu tiltaksgoymslu varð tí avtalað, at tað í staðin verður gjørd forkanning 2024, sum skal verða grundlag undir støðutakan til framhaldandi gongd.

Í áður nevndu avtalu vórðu latnar 11,5 mió. kr. í tíðarskeiðnum 2024-2026 til at víðariflyta pening til Grønlendsku húsini í ávikavist Aalborg, Aarhus, Keypmannahavn og Odense, so húsini kunnu hjálpa nýkomnum grønlendingum í Danmark. Grønlendsku húsini fáa eisini 6 mió. kr. veittar av FL23 frá Norðuratlantspuljuni í tíðarskeiðnum 2023-2026 til at gera og reka studentabústaðir til grønlendskar fyrstaárslesandi í Aalborg og Keypmannahavn.

Harafturat verða av FL23 latnar 3 mió. kr. av Norðuratlantspuljuni til at kanna livikor og -viðurskifti hjá grønlendingum í Danmark, har dentur verður langur á flytimynstur frá Grønlandi til Danmarkar. Det Nationale Forskningscenter for Velfærd (VIVE) ger kanningina 2024 og 2025.

## 2.5 Løgmálaøkið í Grønlandi

Grønlands Politi verksetti 1. januar 2023 politiábótina, sum donsku politiøkini framdu 2007. Samstundis vórðu politilógin umframt nakrar kunngerðir settar í gildi fyri Grønland. Í sambandi við poltiábótina hevur Óhefti politikærumyndugleikin fingið málsføri í Grønlandi, eins og rættarstøðan hjá tí órættaða í revsimálum er styrkt m.a. við at seta eina algongda vegleiðingar- og kunningarskylda fyri politiið mótvegis órættaðum ella næstu avvarðandi hjá teimum, sum eftir sita.

Grønlands Politi hevur ikki í dag atgongd til málsstýringarskipanina hjá politinum, POLSAS. Farið verður undir at verkseta POLSAS í Grønlands Politi 2024. Tað skal bøta um málsviðgerðarloysnina og undirstuðla eina einsháttaða málsviðgerð tvørtur um ríkisfelagsskapin.

Grønlands Politi hevur framt framtøk í mun til fyribyggingarátakið umframt átakið móti kynsligan ágang. Í mun til at nútíðargera bygningarnar hjá Grønlands Politi er ætlanin at endurnýggja 18 støðir og varðhald í Grønlandi, av teimum 15 støð eru liðuggjørd og trý eru ætlað liðuggjørd fyrst í 2024. Harafturat er farið undir at byggja eina nýggja politistøð í Ilulissat og Upernavik. Báðar teirra verða ætlandi lidnar í øðrum ársfjórðingi 2024. Varðstøðarumbyggingin í Nuuk er liðug. Tað er ein fortreyt fyri at uppseta sjónleinki og samtalukervi á 22 deildarstøðum, sum eru ein partur av varðhaldshøliseftirlitinum hjá Grønlands Politi. Ráðlegging og verkseting í sambandi við tað er sett í verk.

Kriminalforsorgin hevur grundað á úrslitini av eini framhaldsviðgerð av eini kanning frá VIVE viðvíkjandi ovbyrjingarandgerðum hjá m.a. stovnsvørðum 2023 arbeitt við at menna kreppufyribúnaðin á stovnunum. Arbeiðið heldur fram komandi árið við tí í hyggju at ganga sálarligu løðsluandgerðunum hjá stovnsvørðunum á møti.

Kriminalforsorgin í Grønlandi hevði eisini í 2023 stóra avriksførisnýting – bæði í mun til afturhildin og dømd, undir hesum trygdarvarðhildin. Kriminalforsorgin hevur sett eitt arbeiði við at eyðmerkja møgulig framtøk í gongd, ið kunnu stytta bíðilistan til stovnsvarðhald.

Stjórnin avgjørdi í juni 2023 at arbeiða við at skapa neyðuga grundarlagið fyri, at lønar- og starvssetanarkor hjá ríkistænastufólkum í Grønlandi varandi verða javnsett við treytirnar hjá tænastufólkum í Danmark, undir hesum politistar og stovnsvørðar. Tað skal avtalast millum avtalupartarnar. Ítøkiliga tíðin, nær tað skal koma í gildi er ikki avgjørd. Fyribils lønarbataavtalurnar fyri politistar og stovnsvørðar í Grønlandi, sum vórðu gjørdar í ávikavist 2020 og 2021, eru í desember 2023 longdar fram til 31. mars 2026. Stjórnin avgjørdi harafturat í november 2023, at javnsetingin eisini skal umfevna tey sáttmálasettu hjá ríkinum.

Inatsisartut hevur í heystsetuni samtykt lógaruppskot um at broyta revsilóg fyri Grønland og rættargangslóg fyri Grønland (Framtøk móti talgildan ágang, undir hesum forboð móti lokking, tað at javnseta samlegu við barn við neyðtøku, sníking til samlegu, misnýtsla hjá átrúnaðarligum leiðarum av átrúnaðarligum bundni við tí í hyggju at fáa sær samlegu o.a.). Lógaruppskotið er 2024 lagt fyri Fólkatingið. Ein lógarbroyting um at verkseta Tjóðarliga eind fyri serlig lógarbrot (NSK) í Grønlandi kemur í gildi 2024. Aftur at tí kemur, at ein broyting í revsilógini við sjálvstøðugt at gera sálarligan harðskap brotsligan er komin í gildi 2024.

22. november 2023 gjørdu stjórnin og allir á Fólkatingi eina fleiráraavtalu fyri búskapin hjá dómstólunum 2024-2027. Í tíðarskeiðnum eru 50,1 mió. kr. settar av til framtøk viðvíkjandi Grønlandi.

Avtalan fer m.a. at styrkja KT-undirstuðla dómstólarnar í Grønlandi, undir hesum talgilda tinglýsningina í Grønlandi. Landsverjin verður styrktur, og peningur verður settur av til at gera eina hjálparverju-samskipan. Harafturat er peningur settur av til at seta fleiri starvsfólk í økisrættunum, undir hesum dómarar.

## 2.6 Útlendingaøkið í Grønlandi

Útlendinga- og Tillagingarmálanráðið fer í 1. ársfjórðingi 2024 í samstarvi við grønlendsku myndugleikarnar at taka stig til at dagføra ríkisborgararættarlóggávuna í Grønland. Seinasta lógarbroytingin á ríkisborgararættarøkinum, ið er dagførd í Grønland, er frá desember 2016.

Stjórnin og Naalakkersuisut gjørdu 6. september 2023 eina endurskoðaða snarbreytaravtalu, sum gevur útlendskum heilsufólkum møguleika fyri skjótari at fáa arbeiðs- og upphaldsloyvi við starvssetan í hyggju í grønlendska heilsu-verkinum.

## 2.7 Arbeiðsumhvørvisøkið og arbeiðsskaðatrygging

1. juli 2023 samtykti Fólkatingið eina lógarbroyting, ið merkir, at grønlendska arbeiðsumhvørvislógin er dagførd, so hon samsvarar við gongdina á arbeiðsumhvørvisøkinum. Lógarbroytingin hevur m.a. styrktan dent á sálarligt arbeiðsumhvørvi við sær, umframt størri bøtur til virki, ið bróta reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini, herd krøv til arbeiðsplássmetingarnar hjá virkjunum og at nýtímansgera reglurnar um samarbeiði hjá virkjum um trygd og heilsu.

Harafturat hevur Arbeiðsmálaráðið saman við Sjálvstýri Grønlands gjørt eitt uppskot til at broyta lóg um arbeiðsskaða í Grønlandi. Lógaruppskotið verður væntandi eftir viðgerð í Grønlandi at verða lagt fram í Fólkatinginum 2024-2025. Lógaruppskotið inniheldur reglur um eina lagaligari meting um viðurkenningarspurningin, tá arbeiðsskaðar eru hendir og eina dagføring og einfalding av arbeiðsskaðaskipanini.

## 2.8 Rudding eftir amerikanska hernaðarliga hjáveru, sum var í Grønlandi

Naalakkersuisut og stjórnin gjørdu í januar 2018 avtalu um at rudda eftir amerikanska hernaðarliga hjáveru, sum var í Grønlandi á støðum, ið ikki longur verða brúkt, og sum ikki eru latin øðrum ella umfevnd av øðrum avtalum. Í verjusemjuni 2018-2023 eri 180 mió. kr. settar av til ruddingina. Av teimum eru um 35 mió. kr. brúktar um árslok 2023.

Síðani 2018 eru fleiri kortleggingar framdar, umframt ruddingarvirksemi og umhvørvismetingar, m.a. i Ikateq og Ittoqqortoormiit (Roysningavík) í Eysturgrønlandi og í Marraq sunnan fyri Nuuk. Stutta arbeiðsárstíðin á staðnum er m.a. ein avbjóðing fyri ruddingaruppgávurnar, tí har er so illa atkomandi. Átøk á øllum støðum má leggjast til rættis eftir metingum hjá Tjóðsavni og skjalasavni Grønlands frammanundan av mentanarvirði.

Síðst í 2023 er gjørd ein eftirmetingarfrágreiðing viðvíkjandi tí at verkseta politisku avtaluna frá 2018. Eftirmetingin vísir tørv á at halda fram við arbeiðnum eftir 2023. Restjáttanin er flutt víðari til endamálið á FL24.

## 2.9 Sjókortadagføring

Ein týðandi fyritreyt fyri sigling og siglingartrygd í Arktis er álítandi sjókort. Jarðdátustýrið hevur síðani 2009 havt samstarvsavtalu við Sjálvstýri Grønlands um at nútímansgera og dagføra sjókort í útsynnings Grønland (Nunap Isua-Upernavik), so tey eru egnað til nútíðarliga sigling til gagns fyri tey sivilu, fullveldishandhevjan og vinnumenning. Um árslok 2023 vóru 55 av teimum 73 sjókortunum gjørt, sum avtalan umfevnir. Tey írestandi 18 sjókortini skulu seinast verða gjørd um árslok 2026. Á FL24 eru 10,4 mió. kr. settar av árliga í tíðarskeiðnum 2024-26 til liðuggerðina. Á FL23 vórðu 4,4 mió. kr. settar av í tíðarskeiðnum 2023-2024 til at kortleggja vald øki nær landi, har sker eru í Grønland fylgisveinatøkni fyri at bøta um sigling nær landi og siglingartrygd. Jarðdátustýrið hevur sent verkætlanina í útboð i november 2023. Væntandi verður veitari funnin fyrst í 2024.

## 2.10 Málsøkjayvirtøka

Naalakkersuisut heimilaði í november 2021 forfólkinum fyri Naalakkersuisut og Naalakkersuisoq fyri vinnu og handil at fyrireika at fara í gongd við komandi samráðingar við ríkismyndugleikarnar viðvíkjandi málsøkjayvirtøkuna vinnufelaga-, roknskapar- og grannskoðanarrøkinum sambært § 3, stk. 3, í sjálvstýrislógini.

# 3. FELAGS SAMSTARVS- OG ÁTAKSØKI

## 3.1 Lóggávudagføring o.a.

Stjórnin hevur sett í gongd, at øll aðalráð í samstarvi við Føroya landsstýri og Naalakkersuisut eftirkanna málsøkini við atliti at fáa eitt tvørgongt heildaryvirlit yvir útistøður t.d. í lóggávuarbeiðnum og slíkum í sambandi við Føroyar og Grønland, sambært samgonguskjalinum. Við støði í tí verður gjørd ítøkilig heildarvirkisætlan ávikavist fyri Føroyar og Grønland, sum tryggjar eina felags fatan av, hvørjar útistøður eru, og hvussu tær verða loystar, undir hesum, hvussu tær verða raðfestar tvørtur um málini, ið úti standa, so tað verður tryggjað, at serligur dentur verður lagdur á at loysa tey sum heild fremst raðfestu málini fyrst.

## 3.2 Styrkt samstarv á uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska økinum

Danmark, Føroyar og Grønland samstarva á uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska økinum innan karmarnar av heimastýris- og sjálvstýrisskipanunum og grundlógini. Uttanríkistænastan arbeiðir fyri áhugamálini hjá øllum ríkisfelagsskapinum, og Verjan verjir trygdina hjá øllum ríkisfelagsskapinum. Samstarvið fer fram bæði tvíliðað og í fleiri altjóða pallum gjøgnum gjølliga samskipan av áhugamálunum hjá londunum.

Stjórnin, Føroya landsstýri og Naalakkersuisut vilja hava eitt tætt, virðiligt og javnsett samstarv um uttanríkis-, trygdar- og verjupolitik við serligum týdningi fyri Føroyar og Grønland. Útbýting av bæði flokkaðari og óflokkaðari kunning er ein týdningarmikil partur av hesum.

Naalakkersuisut var 6. juni 2023 vertur fyri øðrum fundi í Uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiskari samstarvsnevnd, sum varð hildin í Nuuk. Fyrsti fundur í nevndini var í juni 2022 í Tórshavn. Nevndin

hevði á fundinum í Nuuk dent á framhaldandi krígnum hjá Russlandi í Ukraina, uttanríkispolitisku gongdini í Arktis, kunningarútbýting og mongum ítøkiligum málum, sambært endayvirlýsingini frá fundinum. Nevndin er ein politisk yvirbygging á støðuga tætta samstarvinum millum Danmark, Føroyar og Grønland á uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska økinum. Danmark hevur formansskapin í Samstarvsnevndini 2024.

*Samstarv um virksemið hjá USA í Grønlandi*

Í desember 2022 boðaði amerikanska flogvápnið frá, at tænastusáttmálin upp á Thule-herstøðina verður latin grønlendska felagnum Inuksuk A/S (nú Inussuk A/S) fyri eitt 12 ára skeið. Virðið á sáttmálanum er upp ímóti 27,8 mia. kr. Farið varð undir hann fyrst í 2023 við fullari yvirtøku av rakstri og haldi av Thule-herstøðini 1. oktober 2023. Bæði Naalakkersuisut og stjórnin móttóku fráboðanina við nøgd-semi. Eftir grønlendskum ynski broytti Thule Air Base 6. apríl 2023 navn til Pituffik Space Base.

Í juli 2021 upplýsti USA, at 10,4 mió. USD vóru settar av til at styrkja og menna sivila samstarvið við Grønland. Nýggi peningurin kom í framhaldi av 12,1 mió. USD, sum USA játtaði 2020. Sostatt er búskaparligt grundarlag gjørt fyri at viðrismenna samstarvið um t.d. handil, íløgur, búskaparlig viðurskifti, orku, ráevni, útbúgving, ferðavinnu og náttúru-fyrisiting. Verksetingin av verkætlanunum fara fram í samstarvi millum grønlendskar og amerikanskar myndugleikar, meðan yvirskipaða menningin verður fylgd í Joint Committee millum USA, Grønland og Danmark, har seinasti fundur var 28. september 2023 í Grønland.

*Sambandið hjá Føroyum og Grønlandi við ES*

ES er ein týdningarmikil samstarvsfelagi hjá bæði Føroyum og Grønlandi. Arbeitt verður alsamt við at styrkja og útbyggja sambandið. Danmark stýðjar so nógv sum gjørligt upp undir hetta arbeiðið.

Føroyar arbeiða framhaldandi miðvíst við at økja samstarvið við ES, undir hesum serliga við eini betraðari handilsavtalu. Samskiftið millum ES-nevndina og Føroyar um tættari samstarv er økt seinasta árið. 16. januar 2024 góðkendi Ráðið hjá ES fyri búskapar- og fíggjarmálaráðharrar eitt endaligt uppkast til avtalu um at styrkja samstarvið. Samstarvsavtalan verður mett at vera eitt jaligt stig móti eini betraðari handilsavtalu millum Føroyar og ES.

Grønland er knýtt at ES gjøgnum samstarvsskipanina fyri Handanhavslond og øki (OLT). Ráðið samtykti 5. oktober 2021 ráðsavgerðina fyri OLT'ini hjá ES íroknað Grønland, ið m.a. avsetir 225 mió. evrur til Grønland í ES-fíggjarskeiðnum 2021-2027.

ES-nevndin gjørdi í mai 2022 eina formliga viðtøku um at lata eina ES-skrivstovu upp í Nuuk. Skrivstovan skal stýðja upp undir samstarvið, sum í løtuni er, í sambandi við fíggjarstuðulin hjá ES til Grønland innan útbúgving og grønan vøkstur og at eyðmerkja nýggjar samstarvsmøguleikar. Væntað verður, at skrivstovan letur upp fyrru helvt av 2024.

Naalakkersuisut og ES-nevndin undirskrivaði í november 2023 ein samvinnuyvirlýsing um strategiskt samstarv viðvíkjandi altørvandi mineralum.

Endaliga hava Grønland og ES eina fiskivinnusamstarvsavtalu um burðardyggan fiskiskap við ískoyti uppií, ið skipa fiskiskapin hjá ES í grønlendskum sjógvi umframt gjaldið hjá ES fyri tað. Avtalan, sum nú er, fevnir um tíðarskeiðið 2021-2026 og eitt undirliggjandi ískoyti fyri tíðarskeiðið 2021-2024 vórðu gjørd í januar 2021. Væntað verður, at ES-gjaldið til Grønland fyri fiskivinnurættindi og fíggjarstuðul til fiskivinnugeiran sum heild fer at verða 99 mió. evrur í seks ára langa samstarvstíðarskeiðnum. Harafturat kemur loyvisgjald til Grønland frá reiðaravirkjum í ES. Í november 2023 gjørdu Grønland og ES eina avtalu um fiskivinnumøguleikar 2024, sum er síðsta árliga avtalan við ES undir ískoytinum, sum nú er.

*Uttanríkis- og trygdarpolitikkur*

Fregnartænasta verjunnar (FE) metir, at Russland fer at taka framum tað at halda trygdarpolitisku spenningarnar við Vestanlond uttan fyri Arktis, men tað er møguligt, at Russland broytir kós á eina meira stríðshugaða leið – í orðum, á sendistovustigi og hernaðarliga. Trygdarpolitisku viðurskiftini í heimspartinum gerast meira óstøðug orsakað av øktum hernaðarligum virksemi hjá Russlandi og Vestanlondum sum heild, og tí tað eftir russiskum tykki er økt hóttan frá USA og NATO. Áhugin hjá Kina í Arktis er langskygdur og er at vissa sær atgongd til náttúrutilfeingið í heimspartinum og troyta strategisku møguleikarnar. Kríggið í Ukraina hevur við sær, at Russland so við og við er noytt til at geva Kina økta atgongd í Arktis. Tað kann hava við sær, at tey bæði londini í framtíðini fara at samstarva hernaðarliga í heimspartinum.

Føroya landsstýri og Naalakkersuisut hava fordømt kríggið hjá Russlandi í Ukraina og eru farin upp í revsitiltøkini hjá ES móti Russlandi, ið eru samskipað við hini Vestanlondini.

Samstarvið við Russland í Arktisráði hevur verið steðgað síðani 3. mars 2022. 11. mai 2023 varð formansskapurin á einum tykisligum embætismannafundi, har øll arktisk ríki vóru við, fluttur frá Russland til Noreg. Eftir broytingina er latið upp fyri, at avgerðir á tøkniligum stigi kunnu takast í skrivlig mannagongd millum øll átta limaríkini, undir hesum Russland. Talan er ikki um at regluskipa samstarvið við Russland. Framhaldandi verða hvørki persónligir ella tykisligir fundir hildnir. Arktisráð er ikki minst týdningarmikið í mun til upprunafólkini og íbúgvararnar í Arktis, hvørs møguleikar fyri burðardygga menning eru kjarnin í arbeiðnum hjá Arktisráði. Tøtt samskipan er millum Danmark, Føroyar og Grønland um framhaldandi samskiftið við hini samsintu Arktisríkini um, hvussu arbeiðið í Arktisráði kann halda fram, so tilveran og virkisførið hjá ráðnum eisini verður tryggjað í framtíðini.

Fregnartænastan hjá politinum (PET) hevur fyrr mett, at russiskt og kinverskt fregnartænastuvirksemi, undir hesum njósning og ávirkingarvirkni, eru ein hóttan móti ávísum donskum, føroyskum og grønlendskum myndugleikum, avgerðarum, virkjum og granskingarstovnum í Arktis og Norðuratlantshavi. Fyri at ganga ímóti hóttanini frá fregnartænastuvirksemi ráðgevur PET støðugt føroyskum og grønlendskum myndugleikum umframt ríkismyndugleikum. PET hevur í hesum sambandi m.a. skeið um góða trygdarsiðmenning, fyrikunning um njósningarhóttanina og gjøgnumgongdir av fysisku trygdini. Ráðgevingin umfevnir eisini virki, útbúgvingarstovnar og politiið.

PET og FE hava alsamt samskifti við føroyskar og grønlendskar myndugleikar umframt ríkismyndugleikarnar um yvirskipaðu trygdarpolitisku gongdina.

*Samstarvið á verjupolitiska økinum*

Verjan røkir myndugleikauppgávur í Føroyum og Grønlandi, m.a. við sjóeftirliti og fullveldishevd. Verjan er eisini við til at loysa nakrar aðrar uppgávur orsakað av, at hon er á staðnum, undir hesum fiskivinnueftirlit, stuðul til politiið umframt leitingar- og bjargingartænasta. T.d. hjálpti verjan í september 2023 Grønlands Politi í sambandi við, at reikferðaskipið Ocean Explorer rendi á land í tjóðarparkini í Landnyðringsgrønlandi. Verjan røkir eisini havkortlegging og uppgávur á havumhvørvisøkinum í Grønland.

Ein stórur meiriluti í Fólkatinginum gjørdi 28. juni 2023 eina rammuavtalu um eina nýggja verjusemju. Frammanundan avtalaðu stjórnin, Føroya landsstýri og Naalakkersuisut eitt felags grundarlag fyri viðurskifti viðvíkjandi Arktis og Norðuratlantshavi í verjusemjuni. Semjan verður verksett gjøgnum nakrar partavtalur, og stjórnin hevur tætt samskifti við Føroya landsstýri og Naalakkersuisut um viðurskifti viðvíkjandi Arktis og Norðuratlantshavi. Fyrsta partavtala undir verjusemjuni varð gjørd 18. januar 2024 og er gjørd við tøttum uppídrátti av Føroya landsstýri og Naalakkersuisut og við eyga fyri, hvussu verjan í samstarvi við rættar myndugleikar kann verða við til at tryggja alt kongsríkið.

Verksetingin av Arktis-styrkispakkanum frá 2021 er farin í gongd og fer at ganga samstundis sum komandi verjusemja verður verksett. Verjumálaráðið samskiftir við Føroyar og Grønland um at verkseta framtøkini í pakkanum, tí fleiri av framtøkunum verða roynd samanhugsað við verksetanini av nýggju verjusemjuni.

Tað er alsamt vaksandi verjuáhugi fyri Arktis og Norðuratlantshavi. Í 2023 var NATO-venjing kring Føroyar, og tað vóru eins og í 2022 fleiri amerikanskar flotavitjanir í Føroyum. Í juni 2023 var NATO Innovation Challenge í Nuuk.

*Netøkið*

Fremmand ríki og revsiverdir teldusníkar eru ein áhaldandi og álvarlig nethóttan móti øllum ríkisfelagsskapinum. FE segði í mars 2023 í "Nethóttanin móti Grønlandi", at tað hava verið fleiri netálop í Grønlandi, sum ávirkaðu samfelagstýdningarmikið virksemi. Miðstøð fyri nettrygd (CFCS) veitir alsamt Føroyum og Grønlandi ráðgeving um net- og kunningartrygd, undir hesum ráðgeving viðvíkjandi trygging av avgerandi KT-undirstøðukervi. Norðuratlantsliga ráðgevingartoymið hjá CFCS veitir enn stuðul til átak hjá Talgildingarstýri Grønlands fyri at styrkja netverjuna hjá Grønlandi. CFCS er eisini alsamt í samskifti við føroyskar myndugleikar og virki um nettrygd, sum m.a. hevur havt mong ítøkilig samstarvsøki við sær.

## 3.3 Styrkt gransking í veðurlagi, umhvørvi, orku og havi

Í 2024 eru 35 mió. kr. avsettar til virksemi undir Tjóðar-miðstøð fyri veðurlagsgransking (NCKF) hjá DMI, sum m.a. leggur dent á veðurlagsbroytingar í Arktis, undir hesum bæði at hava eftirlit við og framskriva bráðningina frá Innlandsísinum og gongdina við havísinum umframt dent á veðurlagsbroytingar í og kring Norðuratlantshav bæði bráðfeingis og í longdini. Peningurin skal harafturat undirstyðja samstarvið hjá NCKF við aðrar veðurlagsgranskingarstovnar í ríkisfelagsskapinum.

Í 2024 eru 21,2 mió. kr. avsettar til Eftirlitsætlan í sambandi við grønlendska innlandsísin (PROMICE) og amerikanska Greenland Climate Network, ið fyrr var, sum hevur eftirlit við veðurlagsbroytingum og massajavnvág í Innlandsísinum í Grønland. Virksemið fer fram í samstarvi millum GEUS og ASIAQ (Forkanningar Grønlands).

Stjórnin avsetti saman við flokkunum á Fólkstingi í november 2023, sum part í avtalum um at býta granskingar-tiltakspeningin o.a. fyri 2024, 50 mió. kr. til at styrkja arktisku granskingina, ið kann vera við til eina burðardygga menning í Arktis gjøgnum eina betri fatan av veðurlags-broytingunum og týdningin hjá teimum fyri bæði lívmargfeldi, vistskipanir, mentanararv og lívskor í Arktis. Tað geldur eisini samfelagsligar og mentanarligar broytingar í arktisku samfelagunum orsakað av veðurlagsbroytingum.

Gjøgnum veðurlagsstuðul til Arktis undir Veðurlags-, Orku- og Granskingarmálaráðnum verða 19,6 mió. kr. brúktar 2024 til m.a. langskygdar arktiskar veðurlagskanningar í Grønlandi. Átøkini fremja føroyskir, grønlendskir og danskir vitanar- og granskingstovnar. Langskygdu átøkini hava týdning fyri at skilja, hvussu veðurlagsbroytingarnar ávirka Arktis og eru við til at fremja veðurlagsgranskingarátøkini hjá ríkisfelagsskapinum í m.a. Arktisráði.

Gjøgnum umhvørvisstuðul til Arktis undir Umhvørvismálaráðnum verða 33,5 mió. kr. brúktar 2024 til m.a. langskygdar umframt einstakar arktiskar umhvørvis- og náttúrukanningar við Føroyar og í Grønlandi. Átøkini fremja føroyskir, grønlendskir og danskir vitanar- og granskingarstovnar. Langskygdu átøkini hava íkast til altjóða náttúru- og umhvørvissáttmálar, Arktisráð og aðrar viðkomandi pallar og eru týdningarmikil fyri at skilja, hvussu Umhvørvi, náttúra og veðurlagsbroytingarnar ávirka íbúgvarnar í Arktis og vistskipanirnar í heimspartinum, undir hesum havvistskipanir.

## 3.4 Styrktur kunnleiki um ríkisfelagsskapin á mentanar- og undirvísningarøkinum

Á økinum á Mentanarmálaráðnum eru sum heild 133,0 mió. kr. avsettar í tíðarskeiðnum 2023-2027 til framtøk miðjað móti Føroyum og Grønlandi. Tey eru m.a. tiltøk, sum hava til endamáls at styrkja kunnleikan til føroyska og grønlendska mentan, samfelag og mál. Peningur er t.d. avsettur í tíðarskeiðnum 2025-2026 til at gera af ein ella møguliga fleiri heimildarfilmar um fólkaræðisligu fortíðina, nútíðina og framtíðina hjá Grønlandi, eins og tað við Filmavtaluni 2024-2027 varð avtalað at javnseta dansktframleiddar filmar á føroyskum og grønlendskum við filmar á donskum. Danskir framleiðarar kunnu soleiðis søkja um stuðul til filmar á føroyskum og grønlendskum á jøvnum føti við filmar á donskum máli.

Framtøk eru eisini sett í verk, ið skulu fáa ung saman tvørtur um ríkispartarnar og styrkja felagsskapin. Tað geldur t.d. Sjómaq-verkætlanina, sum stuðlar virksemi hjá teimum ungu, og fevnir um minst tveir av ríkispørtunum, umframt háskúlastudningin hjá ríkisfelagsskapinum, ið veitir studning til grønlendsk, føroysk og donsk ungfólk til at fara á háskúla í einum øðrum parti av ríkisfelagsskapinum.

Á økinum Barna- og undirvísingarmálaráðnum eru sum heild 39,9 mió. kr. avsettar í tíðarskeiðnum 2023-2027 til framtøk miðjað móti Føroyum og Grønlandi. Peningurin er m.a. avsettur til ein summarskúla í Grønlandi (Joint Science in Education Project) og ískoyti til ein siðregludepil um

Føroyar og Grønland umframt at fáa í lag ein ferðapulju og eina útbúgvingarpulju. Harafturat er peningur avsettur til eina undirvísingarpulju um føroyska og grønlendska nútíðarsamfelagið, at menna undirvísingartilfar um hjálandasøguna hjá Danmark umframt at styrkja vitanina hjá børnum og ungum um Grønland gjøgnum skúlatænastur.

## 3.5 Fíggjarlig skipan o.a.

Lóg fyri Føroyar um at fremja avmarkandi fyriskipanir mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi komu í gildi 1. juli 2023. Beinleiðis í framhaldi av tí hevur Vinnumálaráðið lýst kunngerð fyri Færøerne um avmarkandi fyriskipanir mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi á økinum hjá Vinnumálaráðnum. Á endurskipanarøkinum og økinum viðvíkjandi tí at avtaka ávís fíggjarligt virksemi fór ein løgskipan í gildi fyri Føroya 1. januar 2024, ið eisini ógildaði lóg um fíggjarligt støðufesti.

Í 2024 skulu fleiri løgskipanir fyri Føroyar viðgerast á Løgtingi við tí í hyggju, at tær fara í gildi 1. juli 2024. Tað snýr seg um broytingarlógir til lóg um fíggjarligt virksemi og lóg um fyribyrgjandi fyriskipanir móti hvívaski og at fíggja yvirgang (hvítvaskilógin).

Lóg fyri Grønland um at fremja avmarkandi fyriskipanir mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi á málsøkjum, ið ikki eru yvirtikin, fóru í gildi 10. mars 2023. Við heimild í lógini verður kunngerð lýst um at nýta ásetingarnar í fyriskipanunum og skjølini til fyriskipanirnar.

Í 2024 skulu mangar fyriskipanir viðvíkjandi Grønlandi viðgerast í Inatsisartut við tí í hyggju, at tær fara í gildi 1. juli 2024. Tað snýr seg um broytingarlógir til lóg um fíggjarligt virksemi, lóg um fyribyrgjandi fyriskipanir móti hvívaski og at fíggja yvirgang (hvítvaskilógin) umframt broytingar av lóg um ein ábyrgdargrunn fyri skaðatryggingarfeløg. Síðstnevnda lóg skal setast í gildi fyri Grønland m.a. við tí endamáli, at Ábyrgdargrunnurin frameftir skal kunna fevna um arbeiðsvanlukkutryggingar í Grønlandi.